## Lokka smádrong til sjálvmorð

Fólk frá Talibanska herinum í Afganistan lokkaðu ein seks ára gamlan smádrong at lata seg í ein bumbuvest, og lærdu hann síðan hvussu hann skuldi kasta seg á amerikanskar hermenn. Tá ið seks ára gamli Juma Gul lat seg í vestin, legði hann skjótt til merkis, at her var okkurt annað endamál. Hann lat seg úr vestinum og rann yvir til afganskar hermenn, sum hjálptu honum víðari. Seinni sama dagin varð smádrongurin innkallaður til borgarstjóran í býnum, har hann greiddi frá søgu síni. Fleiri hermenn vóru til staðar, og sigast allir at hava sitið við tárum í eygunum.



## Yvirgangsmenn tiknir

Spanska løgreglan hevur handtikið tríggjar menn, ið eru undir illgruna at hava verið í sambandi við Al Qaeda. Handtøkan fór fram í spanska stórbýnum Barcelona. Hetta váttar spanska innlendismálaráðið fyri AP. Teir eru millum annað undir illgruna fyri at hava tikið lut í sjálvbodnari venjingarlegu sunnanfyri Sahara, har teir hava verið vandir at fremja yvirgang. Tveir av teimum handtiknu vóru islamnistar.

# Magni vil hava 300 milliónir í avlopi

**Føroyska brúkaraveitslan er liðug. Næsta ár vil Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hava nógv størri yvirskot á fíggjarlógini og heldur ikki kommunurnar sleppa at brúka pengar, sum tær vilja**

FÍGGJARPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Næsta ár skulu bæði landskassin og kommunurnar halda aftur og tálma útreiðslunum. Tað er greiði boðskapurin hjá Magna Laksáfoss, landsstýrismanni í fíggjarmálum, nú hann er farin at leggja fíggjarlógina fyri næsta ár til rættis*

Forbrúkaraveitslan, sum hevur herjað Føroyar hesi seinastu árini, er nú liðug.

Tað er greitt, nú Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, er farin at leggja fíggjarpolitikkin fyri næsta ár til rættis.

Seinastu árini eru útreiðslurnar hjá bæði landinum og kommununum munandi øktar.

Men næsta ár skal tað halda uppat.

- Okkara endamál er, at næsta ár skal avlopið á fíggjarlógini hjá landinum vera munandi størri enn tað er í ár. Men samstundis er tað eisini greitt, at kommunurnar skulu tálma sínum útreiðslum, sigur nýggi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Magni Laksáfoss vísir á, at í ár verður avlopi á fíggjarlógini hjá landinum góðar 140 milliónir.

Men næsta ár hevur hann sett sær fyri, at avlopið skal vera 300 milliónir krónur.

- Sum støðan er í samfelagnum er tað neyðugt, at talið á botnlinjuni verður hægri næsta ár, enn tað hevur verið, sigur hann og tí arbeiðir hann við einum avlopi upp á 300 milliónir.

Men harafturat er Magni Laksáfoss av teirri sannføring, at tað er neyðugt, at allar útreiðslur standa á fíggjarlógini, so at fíggjarlógin gevur eina rættvísa mynd av inntøkum og útreiðslum.

- Tí vil eg ikki hava, at íløgur verða gjørdar, sum ikki standa á fíggjarlógini, tí tað er neyðugt, at allar útreiðslur eru sjónligar á fíggjarlógini.

Sostatt vil landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava at tað skal halda uppat, at íløgur verða gjørdar, sum ikki standa á fíggjarlógini.

Hann sipar til, at í fjør eru íløgur gjørdar, har grunnar eru skipaðir uttanfyri fíggjarlógina fyri at sleppa undan íløgukarminum á fíggjarlógini.

Spurningurin er so, hvussu málið verður rokkið um, at fíggjarlógin næsta ár skal hava eitt avlop upp á 300 milliónir.

Tað kann gerast við at spara útreiðslur, men tað kann eisini gerast við at krevja meiri inn í skatti.

- Tað skal tann politiska telvingin í heyst vísa. Men tað kann staðfessatast, at hvat skattalættum viðvíkur, er ein avtala í samgonguni, so á tí økinum eru nakrar bindingar. Hinvegin hava vit avtalað, at prinsipppið skal vera, at tað er neyðugt at tálma útreiðslunum og at endaliga úrslitið skal vera eitt størri avlop enn í ár.

- Tað er neyðugt at tálma búskapinum, tí hann er ov heitur beint nú. Hetta førir við sær, at trot er á arbeiðsmegi og tað førir til stórar príshækkingar. Tað sæst best av, hvussu nógv dýrari tað er vorðið at byggja. Nógv almenn byggjarí eru nógv dýrari enn mett og alt í alt er ger tann heiti búskapurin, at samfelagið verður nógv dýrari at reka. Sostatt fæst nógv minni fyri pengin.

Samstundis er forbrúkið so stórt, at tað er til bága fyri javnan mótvegis umheiminum.

### Kommunur skulu tálma

Magni Laksáfoss sigur, at skal tað eydnast at fáa eina neyva búskaparliga stýring, er ikki nokk at hyggja eftir inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum einsamøllum.

-Tað er eisini neyðugt at hyggja eftir inntøkum og útreiðslum hjá kommunum, tí tær eru so stórur partur í búskapinum.

Í hesum sambandi hevur landsstýrismaðurin havt fund við tey bæði kommunufeløgini.

Og tað er greitt, at næsta ár sleppa kommunurnar ikki at brúka pening, sum tær vilja.

- Næsta ár skulu útreiðslurnar hjá kommununum tálmast, sigur Magni Laksáfoss.

Spurningurin er so um kommunurnar velja at halda aftur í rakstrinum ella í íløgunum, ella um tær velja eina kombinatión av báðum.

Hann sigur, at fundur hevur verið við kommunurnar og tær eru sinnaðar at vera við í eini ætlan um at tálma búskapinum.

- Tann heilt greiði boðskapurin er, at bæði landið og kommunurnar skulu tálma útreiðslunum næsta ár. Tað er prinsippið, endurtekur Magni Laksáfoss.

Hann heldur, at tað er neyðugt at fáa kommunurnar við, tí seinastu árini eru tað tær, sum hava staðið fyri nógv størri vøkstri í búskapinum, enn landið hevur.

## Føroyskur búskapur linkar

**Búskaparligi vøksturin í Føroyum fer at hæsa av næsta ár, men kortini verður eisini 2008 eitt gott ár**

BÚSKAPARGONGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroyski búskapurin er nú við at linka í kongunum.

Tað vísa tær nýggjastu metingarnar hjá Magna Laksáfoss, landsstýrismanni í fíggjarmálum.

Men hóast hóast tann stóri vøksturin, sum hevur verið, er linkaður, merkir tað ikki, at afturgongd er í búskapinum.

- Næsta ár verður framvegis talan um vøkstur og tað verða framvegis góðar tíðir í Føroyum.

Nú hann er í ferð við at fyrireika fíggjarlógina fyri 2008, eru umfatandi metingar gjørdar av búskaparligur gongdini í ár og næsta ár.

Í hesum sambandi hevur hann havt fundir við vinnuna, Landsbankan og Hagstovuna um gongdina í ár og útlitini fyri næsta ár.

Nýggjasta metingin vísir, at í ár verður búskaparligi vøksturin 10% í leypandi prísum.

Verður lagt upp fyri inflatiónini, verður tann veruligi vøksturin í búskapinum í ár eini 7%.

- Tað er ein øgiliga stórur vøkstur, tí vit skulu ikki gloyma, at eisini í fjør var talan um stóran vøkstur.

Í ár fer innflutningurin av vanligum nýtsluvørum at veksa heili 18% afturímóti í fjør.

Nýtsluvørur eru allar vanligar vørur til húsarhaldið, matur, innbúgv, hvítvørur o.s.fr., men ikki byggitilfar.

Í ár eru eisini heili 30% fleiri bilar skrásettir, enn tað vóru í fjør.

- Sostatt er talan um ein øgiliga stórur vøkstur í innflutninginum í ár, tí vit skulu ikkwi gloyma, at í fjør var eisini talan um stóran vøkstur afturíwmóti 2005.

Men Magni Laksáfoss væntar ikki, at vøksturin fer at vera líka stórur næsta ár.

- Útlit eru til, at toskafiskiskapurin fer at minka, men afturfyri er vøkstur væntandi í alivinnuni. Samstundis sær út til, at forbrúkið fer ikki at vera líka stórt næsta ár og væntandi fer ávirkanin av rentuhækkingunum at sláa rættiliga ígjøgnum næsta ár.

Næsta ár vænta vit at vøksturin fer at vera 5% í leypandi prísum. Men verður lagt upp fyri inflatiónini, vænta vit, at veruligi vøksturin næsta ár verður 2%-3%.

- Sostatt hæsar vøksturin av. Men talan verður framvegis um góðar tíðir og talan verður framvegis um góðan vøkstur í búskapinum, sigur landsstýrismaðurin.

Les eisini hina greinina her á síðuni: Magni vil hava 300 milliónir í yvirskoti.